## Armbondini fáast nú

Nú er tíðin komin til at skifta atgongumerki til Summar Festivalin um við eitt armband, ið allir festivalgestir skulu hava á arminum. Hetta armband kann nú fáast upp á armin í Telebúðini í Klaksvík og í Telebúðini í Havn. Í Telebúðini í Havn verður hetta markerað við live tónleiki. Týsdagin og mikudagin millum kl. 15.00 og 17.00 kunnu armbondini fáast, og tá ber eisini til at fáa eina smakkiroynd av tónleiki frá Summar Festivalinum. Týsdagin spælir Brandur Enni, og mikudagin verður Jens Marni Hansen at hoyra. Í Telebúðini í Klaksvík ber til at støkka inn á gólvið í vanligu upplatingartíðini og fáa armbandið uppá.

## Bygdaleiðir nýtt steðgistað

Í sambandi við Summar Festivalin steðga allar leiðir hjá Bygdaleiðum í Klaksvík við bátabrúgvarnar. Vanliga koyra bussarnir hjá Bygdaleiðum til og frá Sandinum, men hetta økið verður brúkt í sambandi við Summar Festivalin, og tí koyra bussarnir hjá Bygdaleiðum ikki á Sandin næstu dagarnar. Ístaðin verður nýggja steðgiplássið hjá bussunum við Bátabrúgvarnar – millum gomlu Bilstøðina og Statoilstøðina. Eisini steðga bussarnir á Skúlavegi. Broytingin er galdandi frá týsdegnum 31. juli til 8. august.

# - Vit hava ikki vitanina

**Ongin heildarmynd er yvir støðuna og vit hava ikki vitanina. Hetta er niðurstøðan hjá Kjartani Hoydal, nú broytingaruppskot í lógini um vinnuligan fiskiskap verður lagt fyri tingið**

FISKISKAPUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, leggur í hesum døgum uppskot fyri løgtingið, har broytingar verða gjørdar í lógini um vinnuligan fiskiskap. Sum heild verður mælt til ein niðurskurð, ið svarar til eini tvey prosent á landgrunninum.

- Eg havi hugt uppá uppskotið, sum Bjørn Kalsø leggur fyri tingið, og uppskotið er gjørt við viðring fyri fiskidagaskipanini og farið verður javnt eftir skipabólkunum, og tað er annars nakað, sum eg fyrr havi viðmerkt, at har hevur ójavni verið í, sigur Kjartan Hoydal.

Hann metir, at uppskotið hjá landstýrismanninum er á góðari leið, tí minni tygnd verður á toskastovnin, og alt í alt er hetta ein rímulig loysn.

### Vitan

- Sjálvsagt kundi vit tikið meira inn, men tað vita vit ikki, sigur Kjartan Hoydal, sum hevur lisið uppskotið um broytingar í lógini um vinnuligan fiskiskap, sum Bjørn Kalsø nú leggur fyri løgtingið.

- At kanna lógina og fiskidagaskipanina er sera gott hugskot, sigur Kjartan Hoydal.

- Um sjálvan niðurskurðin og prosentini er ilt at hava nakra viðmerking. Tað er nakað, ið vit mugu hyggja nærri at, tí vit hava snøgt sagt ikki vitanina, og tí verður ráðgevingin heldur ikki neyv, sigur Kjartan Hoydal.

### Fleiri kanningar

Hóast kanningar javnan verða gjørdar, so skilst á Kjartani Hoydal, at vitanin er ikki á nóg høgum støði.

- Eg meti, at Bjørn Kalsø hevur gjørt tað, ið hann kann gera útfrá teimum fyritreytum, ið eru, sigur Kjartan Hoydal.

- Vitan. Tað er tað, ið okkum tørvar, sigur Kjartan Hoydal, og vísir á, at summi meta at toskurin er illa fyri, meðan onnur hava aðra meting.

- Eg havi áður víst á kanningina hjá Bjarta Thomsen. Vit skuldu havt fleiri slíkar, tí so hevði verið lættari, sigur Kjartan Hoydal.

- Tað er nú einaferð so, at kanningar bert geva eina ábending. Hetta er ikki bara galdandi í Føroyum, men allastaðni. Tølini eru ikki neyv, men kanningarnar kunnu brúkast søguliga, og tað er har, at vit mugu hyggja nærri, fyri at fáa eina mynd av støðuni, sigur Kjartan Hoydal.

- Hvat tingið ger, er ilt at siga, men vit mugu í øllum førum fáa veruligar kanningar, sigur Kjartan Hoydal, sum metir, at farið nú verður fram við virðing fyri skipanini.

### Eitt kók

Nógv hevur verið frammi um, at menn sleppa ikki út at fáa sær eitt kók.

- Tað er bólkur fimm. Tað hevur verið lætt at sleppa inn í bólkin, men eg meti ikki, at hatta sum heild er ein trupulleiki. Er nógv at fáa, so eru nógvir úti, og er minni at fáa, so eru færri úti. Nú er nóg mikið av virksemið í samfelagnum annars, so eg meti ikki, at hetta verður ein trupulleiki, sigur Kjartan Hoydal.

Hann kemur aftur til somu niðurstøðu.

- Men hetta kann kannast, Vit mugu kanna hagtølini, sigur Kjartan Hoydal í viðmerking til støðuna í bólki fimm.

Niðurstøða hansara er, at hagtølini eru ikki neyv, og hagtølini mugu eisini kannast nærri, fyri at fáa eina søguliga heildarmynd.



*Kjartan Hoydal, fyrrverandi aðalstjóri í Fiskimálaráðnum: Vit hava ov lítla vitan um hagtølini ið eiga at verða kannað søguliga*

### FAKTA

**Kjartan Hoydal**

Útbúgvin fiskifrøðingur.
Fyrrverandi aðalstjóri í fiskimálaráðnum.
Fleiri altjóða størv.
Er stjóri í NEAFC við høvuðssæti í London.
NEAFC stendur fyri; åØåNorth East Atlantic Fisheries Commission

# Nú verður grivið út

**Stórur handilsbygningur verðu skjótt reistur í miðbýnum í Vági**

HANDIL
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Arni Brattaberg og onnur eru ú farin undir stóran handilsbygning í miðbýnum í Vági.

Í løtuni verður grivið út fyri bygninginum.

### Torg

Niðara hæddin verður 720 fermetrar og harav verða 600 fermetrar settir av til matvøruhandil, meðan eitt torg eisini verður, har skipast kann fyri tiltøkum. Eisini verður ein leigari í niðaru hæddini.

Ovara hæddin verður 360 fermetrar og har verður leigað út. Enn er onki avgjørt, men Arni metir, at hóskandi er við tveimum stórum handlum í ovaru hæddini.

### Á jóansøku

Útgrevsturin er nærum liðugur. Byggilioyvið verður væntandi fyri á fundi, tá býráðið í Vági í næstum hevur fund,

- Málið er, at liðugt er á jóansøku komandi ár, men kanska verður tað longu í vár, tí tað tekur einar 8 til 9 mánaðir at byggja slíkan bygning og væntandi verður byrjað í september, sigur Arni Brattaberg.

Tað eru Arni Brattaberg og Rakul Borg, ið standa á odda fyri verkætlanini. Tey reka frammanundan handil í Vági og eru limir í Merco.

Hvussu verður framyvir við limaskapi í nakrari handilsketu er ongin avtala gjørd um, sigur Arni Brattaberg.

Við í verkætlanini eru eisini Kveiking, sum er íløgufelag hjá Suðuroyar Sparikassa, ið egur ein triðing, og eisini er Stuðulsgrunnurin fyri Suðuroyar Sunnaru Helvt við í ætlanini.



*Grivið verður út fyri handilsbygningi í Vági.Soleiðis hevur sæð út í miðbýnum í Vági, men skjótt verður handilsbygnginur reistur á økinum*

*(Myndir; D. Olsen*